

# Árstíðarbroytingar í línufiskiskapi á innaru leiðum

KANNING: í tveimum friðaðum økjum inni við land var mest at fáa av hýsu í mai til juli, og mest av toski í januar til apríl. Hetta vísa tøl frá línuroyndum í 2012 og 2013.



**Petur Steingrund**
fiskifrøðingur

Tær innaru leiðirnar við Føroyar vórðu friðaðar fyri vinnuligan línufiskiskap í juli 2011, fyribils í tvey ár. Hetta varð gjørt fyri at verja smáfiskin, soleiðis at toskastovnurin kundi koma á føtur aftur. Havstovan hevur tó givið línubátum royndarloyvir í tí friðaða økinum fyri at fáa meira vitan um tosk og hýsu á innaru leiðum. Hóast høvðusendamálið við kanningini var at fáa upplýsingar um støddir hjá toski og hýsu í tí friðaða økinum og uttan fyri tað friðaða økið, vísir kanningin eisini, hvussu veiðan av toski og hýsu broytist gjøgnum árið, og tað er tað, sum henda grein snýr seg um.

Í tíðarskeiðnum frá januar 2012 til juli 2013 vóru tøl frá tilsamans 99 túrum tøk fyri tað friðaða økið á innaru leiðum. Meginparturin av túrunum vórðu gjørdir eystan fyri Føroyar (Gøtuvík, Álurin, Tangafjørður – 44 túrar) og norðan fyri Føroyar (Kalsoyarfjørður, Djúpini – 32 túrar), sí Talvu 1 og Mynd 1.

*Talva 1. Royndartúrar í tí friðaða økinum eystan- og norðan fyri Føroyar frá januar 2012 til juli 2013.*

| Mánaður | Eystanfyri | Norðanfyri |
|---|---|---|
| Januar | 5 | 3 |
| Februar | 9 | 14 |
| Mars | 4 | 2 |
| Apríl | 1 | 1 |
| Mai | 1 | 1 |
| Juni | 1 | 8 |
| Juli | 1 | 7 |
| August | 1 | 0 |
| September | 5 | 1 |
| Oktober | 2 | 1 |
| November | 1 | 2 |
| Desember | 1 | 4 |
| Tilsamans | 32 | 44 |

Lítið var at fáa av hýsu í januar til apríl, vanliga færri enn 15 hýsur fyri hvørjar 1000 húkar (Mynd 2). Men í mai-juli var veiðan munandi størri, yvir 50 hýsur fyri hvørjar 1000 húkar. Í september minkaði veiðan munandi, og var lítil restina av árinum, færri enn 20 hýsur fyri hvørjar 1000 húkar. Væl var at fáa av toski í januar til apríl, millum 60 og 140 toskar fyri hvørjar 1000 húkar. Í mai minkaði nøgdin nógv eystanfyri, men helt sær høg norðanfyri (Mynd 3). Í juni-august var veiðan millum 20 og 50 toskar fyri hvørjar 1000 húkar, tað vil siga minni enn helvtin av fiskiskapinum um várið. Í september-desember var betri fiskiskapur, sum lá um einar 60 toskar fyri hvørjar 1000 húkar.

Hendan gongdin gjøgnum árið er neyvan nakað nýtt fyri útróðrarmenn, men gott er tó at skjalfesta slíkt við mátingum. Ein kann spyrja, hví fiskiskapurin eftir toski og hýsu broytist soleiðis gjøgnum árið – um fiskurin er har, men ikki vil taka, ella um hann rýmir. Merkingarroyndir vísa, at toskur er støðufastur, og tí er hugsandi, at toskur hevur verið tilstaðar, men ikki hevur havt so góðan hug á línuni um summarið – hann leggur seg helst meira eftir nebbasild (sildafiskur) og kann fáast við pilki. Nebbasild grevur seg niður í sandin um náttina, og goymir seg annars í sandinum um heystið og veturin (september-apríl, men kemur tó upp at gýta í januar). Hetta ger helst, at meira verður at fáa av toski við línu, tá tað gerst myrkari út á heystið, tí tá leitar toskur sær føði á botni, har, sum agnið liggur.

Við hýsuni er støðan helst øðrvísi. Tíverri eru ongar merkingarroyndir gjørdar av hýsu í nýggjari tíð, men tann stóri munurin millum summar og vetur bendir á, at hýsan fer út frá landi um veturin – tað vil siga rýmir frá økjunum nær landi. Hetta er í samsvari við yvirlitstrolingar hjá Magnusi Heinasyni, sum vísa, at tann mesta hýsan er fingin á djúpum (100-200 m) í mars, meðan nógv er fingið grynri í august. Orsøkin er kanska, at føðin hjá hýsu – ormar og smá krabbadýr – fjalir seg um veturin, og hýsan tí ikki hevur nakað at gera inni við land, har tað kanska eisini er vandameiri at vera.




*Mynd 1. Miðalpositiónir fyri túrar í teimum báðum økjunum Norðanfyri og Eystanfyri (víst við rundingum). Prikkuta økið er tað friðaða økið. 100 m dýpdarlinjan er eisini víst.*




*Mynd 2. Hýsuveiða (tal fyri hvørjar 1000 húkar) í tí stongda økinum nær landi fyri hvønn mánað í árinum (januar 2012 til juli 2013).*




*Mynd 3. Toskaveiða (tal fyri hvørjar 1000 húkar) í tí stongda økinum nær landi fyri hvønn mánað í árinum (januar 2012 til juli 2013).*